Búskapur og vinna:
## Nøgdir við evruna

Ein kanning í Finnlandi vísir, at 69 prosent av finska fólkinum eru væl nøgd við felags gjaldoyrað, sum kom í nýtslu á nýggjárinum. 30 prosent siga, at tey vildu heldur havt gamla gjaldoyrað, markin.

Kanningin vísir eisini, at serliga ungfólk, tænastumenn, sjálvstøðug vinnurekandi og fólk í leiðandi starvi eru fegin um nýggja gjaldoyrað, meðan nógv av teimum eldru halda lítið um broytingina. Eisini sæst, at evran er betur umtókt millum fólkið har suðuri í Finnlandi enn norðanfyri.

## Stuðul gevur meira

Í Noregi halda oljufeløgini, tryggingarfeløgini og tøknifyritøkurnar, at tað almenna letur ov lítlan stuðul til gransking innan oljuvinnuna.

Í fjør rindaði norski ríkiskassin 200 milliónir krónur í stuðuli til gransking, samstundis sum oljufeløgini og tøknifyritøkurnar nýttu 2,7 milliardir krónur til oljugransking.

Knut Aanestad í felagnum hjá tøknifyritøkunum sigur, at størri almennur stuðul kann tryggja, at minni olja verður liggjandi eftir í boriholunum, og tí heldur hann tað vera umráðandi, at tað almenna letur meiri.

Oljufeløgini siga, at verður størri dentur lagdur á kanningar og gransking, kann hetta geva einar 450 milliardir krónur í eyka inntøkum.

- Vit ætla ikki, at tað almenna skal átaka sær okkara útreiðslur, men vit halda, at eitt javnari býti hevði verið hóskandi, sigur Knut Aanestad.

UTTAN ÚR HEIMI

# Amerikanskur tíðinda-maður burturfluttur í Pakistan



*Amerikanski tíðindamaðurin Daniel Pearl, sum situr fangi hjá burturflytarum í Pakistan*
*Mynd: Reuters*

**Fleiri amerikansk bløð hava fingið myndir við telduposti av tí burturflutta Daniel Pearl**

AFGHANISTAN-KREPPAN
*Árni Joensen*

Á einari av myndunum, sum amerikansku bløðini hava fingið í teldupostinum sæst, at onkur heldur einari skammbyrsu ímóti høvdinum á tíðindamanninum. Tann, sum hevði sent teldupostin, nevndi seg "kidnapperguy".

Felagsskapurin, sum hevur burturflutt Daniel Pearl, nevnir seg Tjóðskaparliga fylkingin til endurreisn av frælsi Pakistans.

Sambært amerikansku fjølmiðlunum krevur felagsskapurin, at fangarnir á Guantanamo-herflotastøðini fáa góða viðferð, og felagsskapurin hevur boðað frá, at tann burturflutti tíðindamaðurin fær somu viðferð sum fangarnir á Kuba.

Eitt annað krav hjá burturflytarunum er, at fangarnir á Kuba sleppa at tosa við sakførarar og skyldfólk, og harafturat krevur felagsskapurin, at USA skal lata Pakistan tey jagaraflogførini, sum Pakistan fekk tilsøgn um í áttatiárunum, men sum landið ongantíð hevur fingið.

Daniel Pearl arbeiðir hjá amerikanska blaðnum Wall Street Journal. Hann var í býnum Karashi, tá hann brádliga hvarv seinasta mikudag. Burturflytararnir vilja vera við, at hann kom til Pakistan sum njósnari hjá fregnartænastuni CIA, men hetta hava bæði blaðleiðslan og amerikanska stjórnin avsannað.

Talsmaðurin hjá stjórnini í Washington segði í gjár, at Daniel Pearl hevur einki samband við amerikanskar myndugleikar.

Pakistanskir myndugleikar halda, at tað er ein felagsskapur við tilknýti til al-Qaeda, sum hevur burturflutt amerikanska tíðindamannin.

# Danir smugla sum ongantíð fyrr

**Danir, sum fara eina ferð við ferjunum í Eystrasalti, smugla brennivín og sigarettir sum ongantíð fyrr**

DANMARK
*Árni Joensen*

Hagtølini hjá tollverkinum vísa, at í fjør løgdu tollararnir á Sælandi hald á 67.000 fløskur av brennivíni. Hetta var 30.000 meiri enn árið fyri. Tað sama er við sigarettunum, og í fjør løgdu tollararnir í Rødby hald á heilar 650.000 sigaretttir.

- Fólk halda, at tollararnir hvurvu, tá passeftirlitið varð tikið av, og tað er hugvekjandi, at vit hava lagt hald á nógv meiri brennivín og nógv fleiri sigarettir, sjálvt um vit ikki hava fleiri tollarar, og sjálvt um vit ikki kanna fleiri ferðafólk enn fyrr, sigur ein talsmaður hjá tollverkinum á Sælandi.

Hann leggur afturat, at fyrr plagdu fólk at hava tvær ella tríggjar fløskur av brennivíni við sær, tá tey komu í land, men í dag er vanligt, at fólk royna at smugla einar tíggju fløskur. Umframt tað hava tey fleiri kartengur av sigarettum við sær.

Sambært tollverkinum royna donsku ferðafólkini at fáa nakrar eyka sigarettir við sær í land, meðan tað serliga eru sviar, sum royna at smugla brennivín.

Reiðaríið Scandlines, sum eigur ferjurnar, eru sera fegið um ta nógv øktu søluna umborð. Men ikki allir danskir politikarar eru líka fegnir um, at tað almenna reiðaríið reypar um ta góðu søluna, samstundis sum smuglingin gerst ein størri og størri trupulleiki. Formaðurin í Fólkatingsins skattanevnd, Jens Peter Vernersen, heldur tað vera bæði harmiligt og skammiligt, at reiðaríið skal reypa um gongdina.

Úr Norðurlondum:
## Vandamikil farleið

Í Danmark sýtir sjóverjan fyri at góðtaka ta trygdarskipanina, sum skal tryggja, at skip og bátar ikki sigla á stabbarnar undir brúnni um Stórabelti.

Skipanin varð tikin í nýtslu fyri fýra árum síðani, hóast hvørki sjóverjan ella verjuleiðslan vildu góðtaka hana, men kortini er einki hent. Í gjár visti blaðið Fyens Stiftstidende at siga, at tá eitt skip herfyri kom at standa á einari grynnu har norðuri í sundinum, fekk sjóverjan ikki ávarað skiparan um, at hann var farin av leið, tí trygdarskipanin mistók hetta skipið fyri at vera eitt annað skip, sum var á beinari leið.

Hóast skipanin nú er fýra ára gomul, er málið framvegis í ferðslumálaráðnum og verjumálaráðnum, ið sum vera man harmast um, at tað ikki er loyst enn.

## Eiga ikki at giftast

Karita Bekkemellem Orkheim, sum er stórtingslimur hjá norska Arbeiðaraflokkinum, hevur nú skotið upp, at systkinabørn skulu ikki hava loyvi at giftast. Endamálið við uppskotinum er at forða teimum nógvu systkinabarnagiftunum millum innflytarar.

- Eg dugi at síggja, at myndugleikarnir noyðast at taka stig, sum kunnu tykjast víðgongd, sigur stórtingskvinnan.

Frammanundan hevur formaðurin í Framburðsflokkinum, Carl I. Hagen, skotið upp at avmarka tey skipaðu giftarmálini, sum eru vanlig millum innflytararnar, har genturnar verða noyddar at giftast við monnum, sum foreldrini finna.




GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2,0** Diesel GX<br>gráur, 4 hurðar,<br>árg. 1997, 151.000 km. | 94.000 |
| **Nissan Primera 1,6 LX**<br>grønur, 4 hurðar,<br>árg. 1995, 71.000 km. | 75.000 |
| **Nissan Patrol 2,8TD, Elegance, Van**<br>hvítur, 5 hurðar, árg. 1999. | 228.000 |
| **Peugeot 206 XR 1,9 Diesel**<br>bláur, 5 hurðar,<br>árg. 1999, 80.000 km. | 119.000 |
| **Peugeot 405 GR** 1,9 Diesel St. car<br>vínreyður, 5 hurðar,<br>árg. 1995, 124.000 km. | 79.000 |
| **Peugeot 406 ST 2,0**<br>gráur, 4 hurðar,<br>árg. 1996, 137.000 km. | 118.000 |
| **Opel Corsa 1,4**<br>bláur, 3 hurðar,<br>árg. 1995. | 60.000 |
| **Opel Ascona 1,6**<br>gráur, 5 hurðar,<br>árg. 1988. | 15.000 |
| **Opel Astra 1,8 Club** Wagon<br>grønur, 5 hurðar,<br>árg. 1995, 104.000 km. | 70.000 |
| **Opel Astra 1,4**<br>bláur, 3 hurðar,<br>árg. 1997, 97.000 km. | 70.000 |
| **Opel Astra 1,7TD Wagon**<br>grønur, 5 hurðar,<br>árg. 1995, 99.000 km. | 65.000 |
| **Ford Escort 1,3**<br>reyður, 3 hurðar,<br>árg. 1993. | 30.000 |
| **Ford Escort 1,8 Diesel**<br>gráur, 3 hurðar,<br>árg. 1991. | 30.000 |
| **Mazda 323 F 1,6i GLX**<br>vínreyður, 5 hurðar,<br>árg. 1996, 116.000 km. | 77.000 |
| **Citroen Xsara 1,8 Coupe**<br>gulur, 2 hurðar,<br>árg. 1998, 51.000 km. | 87.600 |
| **VW Golf 1,6 Diesel**<br>gráur, 3 hurðar,<br>árg. 1990, 135.000 km. | 25.000 |
| **Toyota Carina E 2,0 TD**<br>hvítur, 4 hurðar,<br>árg. 1997, 243.000 km. | 110.000 |
| **Toyota Carina E 1,6**<br>brúnur, 4 hurðar,<br>árg. 1993, 122.000 km. | 61.000 |

Sosialurin

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Pedagogur til Býlingshúsið á Flat**

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi til Býlingshúsið á Flat.

**Starvið**
Talan er um eitt pedagogstarv í Ritustovu, ið er ein barnagarðsstova við 20 børnum. Starvið er 35 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Býlingshúsið á Flat er normerað til 52 børn, har eru tvær barnagarðsstovur við 20 børnum á hvørjari stovu og vøggustova við 12 børnum.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har ikki er langt til fjals og fjøru. 52 fitt børn við góðum foreldrum.

**Vit ynskja at umsøkjarin**
- hevur góð samstarvsevni
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- er álítandi ,nærlagdur og røkin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Setunarviðurskifti**
Starvið er frá 15 februar 2002,ella eftir nærri avtalu. Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag/Fíggjarmálastýrið og Kommunurnar

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Elsu Klein Olsen, leiðara,tlf 318371 ella Katrina Petersen, samskipara,tlf 31 51 60

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum á Flat, Per Mohrsvegur 11,188 Hoyvík, í hendi seinast 11.februar 2002

SNARSKIVAN



LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Fulltrúar/løgfrøðingar**

Løgmansskrivstovan søkir við hesum eftirfulltrúum/løgfrøðingum.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroytt løgfrøðiligt arbeiði so sum gerð av løgfrøðiligum responsa, eftirkanning av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og aðrar løgfrøðiligar uppgávur, eitt nú menning og samskipan av lóggávuarbeiðinum í miðfyrisitingini, og løgfrøðiligar arbeiðsuppgávur, ið standast av málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv. Tó kunnu eisini tey søkja, ið væntandi verða liðug við slíka útbúgving komandi summar.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar við atliti til, at roknast kann við stórum broytingum á økinum næstu árini. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og við sera góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra, tlf. 351010, fyri at frætta meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Løgmansskrivstovuni
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 12. februar 2002 kl. 16.00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.



DRYKKIR
at taka við út úr húsinum

| | |
|---|---|
| KAFFI koppur | 12,- |
| krúss | 15,- |
| ESPRESSO einkultur | 15,- |
| dubultur | 20,- |
| CHOCOKAFFI | 20,- |
| ESPRESCHOCO | 20,- |
| CAPPUCINO | 20,- |
| CAFÉ AU LAIT | 20,- |
| CAFÉ LATTÉ | 20,- |

livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25



Sosialurin Sosialurin Sosialurin



ATHENA
FRISØR & KOSMETOLOG
BEINTA MIDJORD
FRISØR
MAJKEN SANDÁ
KOSMETOLOG
athena á gørðunum fo-9oo vágur tel 37 33 37

NÝGGJ MINERAL MAKE-UP FRÁ JANE IREDALE

petur & petur • 320870